Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 9**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um spillivatnsætlan fyri Vestmanna Kommunu.
J. nr. 2009-298

Nevndin mælir til at samtykkja spillivatnsætlanina.

**Viðv. 9**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 10**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um munnligan fyrispurning frá Birtu Didriksen um møguleikan fyri at byggja á ogn teirra matr. nr. 26a.

Nevndin mælir til at ganga fyrispurninginum á møti.

**Viðv. 10**
Aftaná at skráin varð send út, hevur ivi stungið seg upp, um tilmælið er nøktandi, verður skotið upp at broyta tilmælið til soljóðandi:
Áðrenn fyrispurningurin um møguliga bygging á matr. nr. 26a kann gangast á møti, verður mælt til at kanna, um møguligt er at broyta byggisamtyktina fyri økið ella fyri part av økinum.

Atkvøtt var um broytta tilmælið, sum varð einmælt samtykt.

**Mál 11**
Semja millum Vestmanna og Kvívíkar kommunur um bátahylssakarmálið.
Borgarstjórin mælir til at taka undir við uppskotinum til semju, dagf. 04.02.2011.

**Viðv. 11**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.00.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen Jón Mikkelsen

Evelyn Gaard Siri S. Niclassen Bárður Poulsen